## Potter-høvundur gevur Labour millión



Harry Potter-høvundurin, Joanne K. Rowling, hevur latið eina millión pund, ella umleið 9,5 milliónir krónur, til enska politiska flokkin Labour, sum í dag byrjar fimm dagar langa flokstingið í Manchester. Tað váttar høvundurin sjálv. Rowling vil fegin stuðla arbeiðinum hjá flokkinum fyri útsett børn, og fíggjarligi stuðulin er kærkomin fyri Gordon Brown, forsætismálaráðharra, sum stendur framman fyri sínari størstu politisku avbjóðing sum leiðari fyri flokkin. Rowling eigur sambært metingum 560 milliónir pund, svarandi til umleið 5,36 milliardir krónur, sum hon hevur forvunnið við vælumtóktu barnabókunum um Harry Potter. Hon er góður vinur við Gordon Brown og konu hansara Sarah, men hetta er fyrstu ferð, at hon donerar pengar til flokkin.

# Bjartskygdur um olju-brunn á landgrunninum

**Góðir møguleikar eru at gera eitt oljufund á føroyska landgrunninum, tá italska oljufelagið ENI saman við tí føroyska Føroya Kolvetni, fer at bora á Anne Marie leiðini í mai næsta ár. Hetta segði Richard Hardmann, bretskur jarðfrøðingur og nevndarlimur í Atlantic Petroleum UK á Oljutinginum í Havn í vikuni**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Richard Hardmann og Magni Laksáfoss tosaðu um oljuprísin, orku og um komandi oljuleiting á landgrunninum á Oljutinginum í farnu viku*

*Mynd Jan Müller*

- Eg eri sera bjartskygdur um næsta brunnin, sum fer at verða boraður við Føroyar, og eg vóni, at boringin fer at enda við, at tit gera eitt lønandi oljufund. Tað er tó ein spurningur, um eitt oljufund har verður nóg stórt, men tað er eisini ein spurningur um kostnað. Í løtuni eru boripallar so dýrir orsakað av tí høga oljuprísinum, at nærum eingin hevur ráð til at brúka teir. Kunnu vit minka um leitiútreiðslurnar, so nýtist eitt fund kanska ikki at vera so stórt fyri, at tað kann gerast lønandi.

Richard Hardmenn sigur víðari, at eitt oljufund við Føroyar má vera upp til 200 milliónir tunnur stórt fyri at verða lønandi. Hann heldur, at sannlíkindini fyri at gera eitt fund eru 1 til 3 og til at gera eitt lønandi fund 1 út av 10.

Richard Hardmann vísir á, at orsøkin til at júst Anne Marie prospektið er so áhugavert er tann, at jarðfrøðiligu viðurskiftini og fortreytirnar fyri at kunna goyma olju sýnast at vera til steðar har.

Hann vísir á, at í eitt nú Marjunbrunninum, sum hann sjálvur var við til at bora, vóru ikki allar fortreytirnar til steðar, hóast olja varð funnin. Richard Hardmann fer tó so langt, sum at gita, at Anne Marie økið, sum verður borað í næsta ár, kann verða líkt stóru oljukelduni bretsku megin markið, Schiehallion.

Umframt Richard Hardmann røddi eisini Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur á Oljutinginum um oljuprís og støðu Føroya í orkuhøpi.

### Magni góður í bretskari stjórn

Rás2/Sosialurin spurdi Richard Hardmann, hvørji ráð hann hevur til hin fyrilestrarhaldaran og politikaran á Oljutinginum, Magna Laksáfoss, um so er, at hann verður partur av eini komandi samgongu?

- Honum nýtist ikki góð ráð. Hann hevur fatur í tí rætta endanum, tá hann tosar um orku og olju. Eg kann bara taka undir við øllum tí, sum hann hevur sagt frá á Oljutinginum. Eg haldi, at Føroyar eru sera hepnar at hava ein persón sum Magna Laksáfoss, tí hann veit, hvat hann tosar um. Eg taki fult undir við honum. Tað hevði glett meg, um ein persónur sum Magni varð í bretsku stjórnini.

Niðurstøðan hjá Magna Laksáfoss á Oljutinginum var, at vit føroyingar skjótast eiga at gera okkum minni bundnar at oljuni og útbyggja alternativar orkukeldur.

## Brennievni økir munandi um innflutningin

INNFLUTNINGSTØL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fyrstu sjey mánaðirnar í ár var innflutningurin 3.007 milliiónir krónur. Tað eru 89 milliónir minni enn enn somu tíð síðsta ár.

Tað upplýsir Hagstovan á sínari heimasíðu.

Men verða skip og flogfør ikki tald upp í, er innflutningurin fyrstu sjey mánaðirnar í ár 2.994 milliónir krónur aftur ímóti 2.892 milliónum síðsta ár. Tilsamans er innflutningurin sostatt minkaður 3%, men verða skip og flogfør ikki tald við, er talan um ein vøkstur á 4%

Nógv størsti vøksturin er í innflutningi av brennievni, har innflutningsvirðið er 42% hægri í ár enn tað var í fjør. Haraftur ímóti eru nøgdirnar tær somu, so tað eru príshækkingarnar, sum elva til, at innflutningsvirðið veksur so nógv. Hinvegin gera seinkingar í skrásetingini av innflutningi av brennievni, at vøksturin er uppaftur størri enn Hagstovan higartil hevur mett hann, sigur hon.

Tilfar til annan ídnað er eisini eitt sindur størri enn sama tíðarskeið síðsta ár, men í øllum øðrum bólkum er talan um eina minking

Hagstovan sigur eisini, at nøgdin av gassolju og brenniolju sum er innflutt seinastu 20 árini, hevur verið rættuliga støðug.

Hyggja vit at virðinum av oljuni sum er innflutt, síggja vit at virðið fram til 1999 eisini lá rættuliga støðugt, meðan virðið síðan er vaksið munandi. Vøksturin hevur verið í trimum umførum, frá 1999 til 2001, 2003 til 2006, og so aftur nú. Tilsamans er virðið av innflutninginum er í dag meir enn fimm ferðir størri enn tað var í 1989, meðan nøgdirnar eru ein triðing størri.

# Tolið hjá leirvíkingum við at ganga undan

**Um 10 dagar loyvið útgingið at binda vegin frá Norðoyatunlinum í Leirvíksvegin, men enn vita tey einki um, nær nýggjur vegur verður gjørdur**

LEIRVÍKSVEGURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Um 10 dagar gongur loyvið at binda vegin frá Norðoyatunlinum í Leirvíksvegin út.

Og Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík, letur tað vera ein opnan spurning, hvørja støðu bygdaráðið fer at hava til at longja loyvið enn einaferð.

- Tað veldst alt um, hvørja støðu, tann nýggja samgongan hevur til málið, sigur hon.

Hon sigur, at fáa leirvíkingar trygd fyri, at ein vegurin verður gjørdur næsta ár, verður tað sjálvandi góðtikið, tí tey vilja helst hava eina loysn í sátt og semju.

Men hon vil ikki spáa um, hvat fer at henda, fáa leirvíkingar ikki trygd fyri at vegurin verður gjørdur næsta ár.

- Tað verður ein spurningur, vit taka støðu til, tá ið vit vita, hvørja lagnu, vegurin fær.

Vegurin í gjøgnum Leirvík í sambandið við Norðoyatunnilin hevur verið ein politisk kastibløka í fleiri ár og Leirvíkar Bygdaráð hevur fyrr róð framundir, at ein møguleiki, tey hava, er at nokta fyri at longja loyvið at binda tunnilsvegin í bygdarvegin í Leirvík.

- Vit vænta avgjørt, at vegurin verður gjørdur nú, og vísir tað seg ikki at vera so, verður tað ein spurningur, vit taka upp tá.

Men hon vil ikki svara upp á um talan kann verða um at nokta at longja íbindingarloyvið.

- Tað fáa vit at síggja, tá ið tann støðan er íkomin. Fyribils hugsa vit bara um at fáa málið loyst.

Hon sigur, at nú er ongin umbering fyri ikki at gera vegin, tí landsins myndugleikar fingu í summar eina greiða fráboðan frá bygdaráðnum um, hvussu vegaføringin skuldi vera.

Men vit vilja hava gongd á nú, so at hann verður mestsum liðugur í næsta ár og tað merkir, at ein munandi upphædd skal setast av til vegin á fíggjarlógini fyri 2009.

- Tað er øgiliga umráðandi fyri okkum, at hann verður gjørdur í einum og at hann byrjar nú, leggur bygdaráðsformaðurin afturat.

- Vit kunnu ikki liva við hesum longur. Ferðmarkið verður yvirhøvur ikki virt og tí er tað fullkomiliga óforsvarligt, sum nú fer fram.

Fríðgerð Heinesen vísir eisini á, at vegurin ígjøgnum Leirvík, var ein partur av norðoyatunnils-verkætlanini og hon heldur, at politiski myndugleikin átti at gjørt hesa verkætlanina heilt lidna, áðrenn teir fóru undir eina nýggja tunnilsverkætlan.